# Tey ungu skulu vera á staðnum

**Fólk við Skálafjørðin halda ikki, at tað er nóg gott, at ungdómurin koyrir til Havnar at dansa, og tey hava nú tikið stig til dansitiltøk á Glyvrum**

TRIVNAÐUR
*Edvard Joensen*

**Glyvrum:** Tey ungu mugu hava møguleikan at verða verandi á staðnum, heldur áhugafelagið hjá Støkk, sum leygarkvøldið fer at skipa fyri dansitiltaki í Støkkhøllini á Glyvrum.

– Tað harmar okkum, at ungdómurin, sum ikki gongur á møti ella spælir bólt, einki petti skal hava at fara til um vikuskiftini, uttan at koyra til Havnar at dansa, sigur Peddy Højgaard, sum er kassameistari í áhugafelagnum hjá fimleikafelagnum Støkk. Umframt ítrótt og møti eru teldukaféirnar einastu møtistøðini, ungdómurin við Skálfjørðin hevur í frítíðini. Og tað er ikki nóg gott, sigur hon avgjørd.

Hon sigur, at hetta hevur felagið gjørt av at gera nakað við, og fyrsta tiltakið verður dansitiltakið, sum verður í Søtkkhøllini leygarkvøldið, har rockbólkurin Flux fer at spæla til dans.



*Áhugafelagið hjá Støkk fer at skipa fyri regluligum dansitiltøkum í Støkkhøllini*

*Mynd: Edvard Joensen*

Í grundini er hetta ætlað teimum heilt ungu, sigur hon, men vónar tó, at tað eisini fer at hava áhuga hjá teimum, sum annars plaga at koyra til Havnar við náttbussunum.

– Vit ætla, at hetta við tíðini skal verða meira enn bara eitt dansikvøld, har ungdómurin dansar tekno og alt hetta her, tey plaga, sigur Peddy Højggard. Vit fara at royna at fáa fólk t læra tey at dana annað enn hetta supermodernaða, sum øll brúka í dag. Vanligar dansir, sum vit hava kent í nógv ár, men sum nú næstan ikki síggjast longur, sigur hon.

Hon sigur, at fleiri av hesum ungdómunum kennir hon frá fimleikafelagnum, har tey eru rættiliga íðin. Og rytmur og rørslur, tey har brúka, metir hon, tey bara kunnu føra víðari í dansinum.

– Eg síggi dansin sum eitt beinleiðis framhald av fimleikinum, sigur Peddy Højgaard.

Ongum nýtist at óttast fyri, at tað verður nakar ólevnaður av, at hesi heilt ungu fólkini fara í dans í Støkkhøllini, greiðir hon frá.

– Vit hava gjørt av, at hetta skulu vera rúsfrí tiltøk, og vit hava til hetta fyrsta tiltakið eisini fingið vaksin fólk at vera til staðar.

– Tað má vera ein treyt, at duravørðar og onnur, sum skulu halda skil á, mugu vera tilkomin fólk, sum tey yngru hava virðing fyri. Annars missa tey bara tamarhaldið á øllum, sigur hon.

Peddy Højgaard sigur, at tey hava sett nøsina upp eftir, at tiltakið kann haldast eina ferð um mánaðan. Men tað kann eisini broytast, alt eftir hvussu tørvurin visir seg. Bæði oftari og sjálvdanari, um tað skal vera.

Fyri at tiltøkini skulu eydnast sum best og helst halda fram, høvdu tey verið fegin, um so mong vaksin fólk sum møguligt hildu seg til at hjálpa til í Støkkhøllini. Hóast fólk er fingið til hetta fysta tiltakið, er neyðugt við fleiri, um haldast skal fram, ljóðar áheitanin frá kassameistaranum í áhugafelagnum hjá Støkk.

# Flux í Støkkhøllini



*Flux fer at standa fyri tónleikinum, tá Støkk skipar fyri dansi fyri ung í Støkkhøllini*

**Fimleikafelagið Støkk á Glyvrum hevur gjørt gerðabýti við rockbólkin Flux. Aftur fyri at spæla til dans í Støkkhøllini, sleppa teir at brúka hana til venjingarhøli**

GERÐABÝTI
*Edvard Joensen*

**Glyvrum:** Hjálpir tú mær, hjálpi eg tær afturfyri, tykist vera setningurin, fimleikafelagið Støkk og rockbólkurin Flux arbeiða eftir. Leygarkvøldið skal fyrsta úrslitið av samstarvinum vísa seg.

Hans Marius Ziska sum spælir við Flux, sigur við Sosialin, at teir stóðu og manglaðu eitt venjingarhøli, tá teir fingu tilboð um at sleppa í Støkkhøllina at venja í móti at spæla regluliga til dans í høllini.

Á hendan hátt fingu teir loyst teirra egna hølistrupulleika, eins og teir kundu vera við til at skapa fimlekafelagnum nakrar inntøkur.

– Hvat lagt verður i regluligan dans, dugi eg ikki at siga akkurát, men einaferð um mánaðan enn kanska ikki so ofta, man vera á eini leið, heldur Hans Marius Ziska.

Hann sigur, at teir fara at leggja seg eftir at spæla slíkt, sum fólk kenna, tá teir fara at spæla til dans.

– Tað er annars ikki at spæla til dans, vit eru mest kendir fyri, sigur hann. Vit spæla vanliga rock, nýskapandi rock. Men okkum dámar best at spæla egnan tónleik, og tað kunnu vit best gera til konsertir og tílík høvi.

Tey høvini hevur Flux eisini havt, vísir hann á. Tvær feðrir hava teir verið við til Prix Føroyar finalur uttan tó at hava vunnið.

Tvær ferðir hava teir verið í Grønlandi og spælt. Teir hava vunnið POP TOP kappingina, eins og teir til dømis eisini hava luttikið á fleiri ólavsøkukonsertum.

Teir hava gørt nakað av egnum tónleiki, sigur Hans Marius. Okkurt hevur hann sjálvur gjørt einsamallur, meðan annað er gjørt í felag.

Fýra mans eru teir í orkestrinum. Í aldrinum 19 til 25 ár. Tríggir teirra hava spælt rímiliga leingi saman, meðan tann fjórði hevur verið heldur styttri uppií.



Finnbogi Ísakson:

# Helvtin verður avgreitt

**Helvtin av teimum málunum, sum løgtingið hevur eftir at viðgera áðrenn løgtingsvalið verða avgreidd. Løgtingsformaðurin heldur, at oftan royna tingmenn at vísa seg fram í sambandi valstríð meira enn nakað annað. Størru málini áttu at verið komin langt fyrr, heldur Finnbogi Ísakson**



*–Lønarviðurskiftini hava gjørt tað soleiðis, at tað vera færri, sum fara at stilla upp, og um eini tvey ella trý val, so verður tað munandi øðrvísi ting, sigur Finnbogi Ísakson.*

LØGTINGSARBEIÐI
*Heri á Rógvi*

Løgtingsformaðurin og starvsfólki á løgtingsskrivstovuni hava úr at gera um dagarnar, tí nógv er, ið skal avgreiðast, áðrenn tingið fer til hús 15. mars. Løgtingsformaðurin, Finnbogi Ísakson, hevur valt at halda siðvenjuna og sendir tingið til hús 15. mars, hóast Løgtingið eftir lógina kundi hildið fram við arbeiðinum til sjálvan valdagin. Síðsti dagur at leggja mál fyri Løgtingið var 4. mars, og henda dagin vórðu ikki færri enn 24 uppskot løgd fyri tingið.

Teir fyrispurningar, sum eru eftir at svara, skulu svarast áðrenn hósdagin í komandi viku.

Vit settu løgtingsformanninum spurningin, hvat hann heldur um hesi nógvu uppskotini, sum løgtingslimirnir leggja fram í tólvta tíma?

–Talið av uppskotum, ið koma seinasta dag, er, eftir fýra árum er farin niður um ein fjórðing, og hetta er ikki heilt galið. Í ár er ein serlig støða, tí frá tí, at tey síðstu málini kundu leggjast fram, 4. mars, til løgtingsval verður útskrivað eru bara tvær vikur. Tað vil siga, at frammanundan hevði mann bæði mars og apríl. Tú mást eisini roknað við, at nøkur av málunum, sum eru komin niðan í tingið í síðstu løtu, eru komin fram meira fyri at vísa vilja í sambandi við valstríðið.

*Hvussu fer hetta at ávirka viðgerðina í hvørjum einstakum máli?*

–Tað ávirkar á tann hátt, at, skulu tey avgreiðast, so fær ein nevnd ikki ta tíð, ið hon hevur krav uppá. Sambært tingskipanini er tað soleiðis, at ein nevnd hevur krav uppá, at viðgera eitt mál í ein mánað, men nú kann nevndin – um málið skal viðgerast liðugt innan fjúrtan dagar – so hevur nevndin bert einar tveir ella tríggjar dagar til viðgera málið. Hetta merkir ikki, at málini ikki verða viðgjørd væl. Tað hevur eisini stóra ávirkan, hvussu stóra málini eru, men í øllum førum fáa tingmenn ikki ta umhugsunartíð, ið teir eiga.

*Hvat við tí, at eitt aðalorðaskifti um ein mentanarpolitikk, har tað hevur tikið fleiri ár at gera eitt álit, verður hildið í tinginum beint undan, at tingið fer til hús?*

–Ein landsstýrismaður hevur altíð krav uppá at leggja eitt álit fram og fáa eitt aðalorðaskifti, um hann ynskir tað. Hetta skal vera innan 6 dagar eftir, at frágreiðingin er løgd fram. Tískil kann løgtingsformaðurin ikki leypa málið um. Sjálvur haldi eg ikki, at tað er serliga viðkomandi at hava eitt aðalorðaskifti um eitt so stórt mál beint undan, at tingið fer til hús. Eitt nú hevur Eyðun Elttør (landsstýrismaður í olju- og umhvørvismálum, blðm.) lagt fram eina frágreiðing um olju, men hann hevur sagt, at tað er ikki so átrokandi at fáa eitt aðalorðaskifti beinanvegin.

*Hvussu verður so; verða málini viðgjørd?*

–Eg rokni við sum givið, at øll málini fáa ein fyrstu viðgerð í hesari vikuni. Soleiðis at arbeiðast kann víðari við teimum í komandi viku, um løgmaður ikki skrivar út val longu tá. Eg rokni ikki við, at meira enn helvtin av málunum verða avgreidd.

*Hvussu fer hetta at ávirka arbeiðið hjá Løgtinginum?*

–Tað verður soleiðis, at nevndirnar hava sum vant fyrrapartarnar týsdag, mikudag og hósdag. Eg rokni við, at teir næstu tingfundirnir fara at vera heilt til kl. 22, sum er so leingi, ið tingskipanin loyvir, at tingfundir kunnu vera, um landið ikki stendur í vága, men so galið er tað ikki kortini.

*Hvussu er við, at stór mál verða tikin fram so seint í tingsetuni og áðrenn valið?*

–Serliga stór mál eiga ikki at koma fram, um tað skal koma ígjøgnum, fjúrtan dagar áðrenn tingið fer til hús. Tað er ikki rímiligt, tá tingið hevur, sambært tingskipanini, rætt til at viðgera mál í 40 dagar.

*Verður demokratiið og kanska eisini trygdin hjá borgarunum sett til viks við tílíkum málum, har skotbráið er so mikið stutt?*

–Um meiningin var, at eitt so umfatandi mál sum málið viðvíkjandi skattalættanum skuldi koma ígjøgnum, so var rættast at koma við tí fyrr. Eg upplivi annars eitt nýtt óskil nú í mun til áður, har samgongumenn ella samgonguflokkar sjálvir leggja uppskot fram. Tá mann er í samgongu, plagar mann at halda seg til, hvat landsstýrið leggur fram og ikki meira.

*Nú tú fer frá sum politikari og løgtingsformaður, hvørji eru so tíni ráð til tann komandi løgtingsformannin?*

–Eg havi ikki so øgiliga nógv ráð. Kanska tað at fáa broytt tingskipanina einaferð aftur, sum eg sjálvur ongantíð kom til, soleiðis at ásett verður eina seinastu freist um heystið fyri mál, ið skulu koma í gildi á nýggjárinum. Hetta er typiskt skattalógir og lógir innanfyri almannaverkið. Tað hendir seg heldur ofta, at mál koma seint fram, men støðan er batnað. Eg havi tó verið útfyri, at týðandi broytingar í skattalógini eru vorðnar skundaður ígjøgnum innan tveir dagar, og hetta er ikki forsvarligt. Ein freist kundi verið sett fyri fyrstu viku í november, har mál eiga at verða komin inn, um tey skulu koma í gildi á nýggjárinum.

*Heldur tú, at tingmenn hava ment seg við størru uppgávunum seinastu tíðina?*

–Eg haldi, at tað hevur ment arbeiði nógv, at tingmenn hava fingið møguleikan bara at vera tingmenn og fyri tað mesta ikki hava annað arbeiði.

Hyggja vit í tingsalin í Føroyum í mun til lond rundanum okkum, so síggja vit, at fleiri tingmenn eru á fundi her enn aðrastaðni. Tað kemur ikki mestsum ikki fyri, at tingmenn taka orðið, og tú kanst merkja, at teir ikki hava innlit í, hvat teir tosa um.

*Heldur tú vit nærkast okkum einari nýggjari tíð innan tingarbeiði?*

–Vit nærkast einari nýggjari tíð. Vit mugu eisini minnast til, at vit hava yvirtikið nógv fleiri málsøki. Tær fysisku umstøðurnar eru vorðnar betur.

Lønarviðurskiftini hava gjørt tað soleiðis, at tað vera færri, sum fara at stilla upp, og um eini tvey ella trý val, so verður tað munandi øðrvísi ting.

Tey, ið stilla upp, mugu vita, at tað er veruligt at stórt lesiarbeiði at vera tingmaður. Tað krevur meira enn áður, tí tað eru nógv fleiri frágreiðingar og annað at lesa. Tað er eitt rættiliga stórt arbeiði.

*Er nýggja skipanin farin at virka?*

–Skipanin er byrja at virka. Tað hongur eisini saman við tí, at tú tók og umskipaði landsumsitingina til at vera bæði størri og betri arbeiðsføra.

